# Sandoyingar komnir á turt

*Undirhaldsvirðið lá í stórum málmøguleikum báðar vegir, tá sumbingar vitjaðu á Sandi*



*Við sigrinum á Sumba tryggjaði B71 sær framhaldandi sæti í bestu deildini. Sumbingar liva hinvegin framvegis í óvissuni um, hvat framtíðin hevur at bjóða*

B71-Sumba 3-0 (1-0)

B71 verður eisini komandi ár í bestu deildini. Teir vunnu í góðveðrinum sunnudagin 3–0 á Sumba, sum framvegis er í vanda fyri at flyta niður.

Fýra jugoslavar vóru á gestandi liðnum. Ein jugoslavi, ein pólverji og tveir danir vóru á heimaliðnum. Men sjálvt um tað bara vóru fýra sandoyingar á B71 liðnum, so var ikki minni lagt í fyri at tryggja framhaldandi 1. deildarfótbólt á Sandi. Spenningur var í alla tíðina. Spælið var ikki altíð so rudduligt. Sandoyingar halda sjálvir, at vat spæli viðvíkur mundi hetta vera eitt tað vánaligasta avrikið hjá teimum í ár.

Kortini var tað rættuliga undirhaldandi, tí bæði liðini høvdu fleiri stórar málmøguleikar.

B71 fekk hol á í 17. minutti. Miðverjin, Bergleif Sólsker, varð skrásettur fyri málið. Hornasparksinnlegg kom úr vinstru, bólturin varð beindur út í hitt borðið, og tá hann kom innfyri aftur, var Bergleif fyrstur at seta krúllin undir hann.

Sumbingar fingu undan steðginum ein risa møguleika at javna. Í besta Jesper Olsen stíli spældi B71 verjan, har Jógvan Jón Petersen var aftastur og Bergleif Sólsker og Bernhard Petersen eftiransarar, Sasa Tomajek púra blankan. Sum so mangan áður var Valdemar Nowisci tryggur aftasti skansi hjá B71, og hann megnaði at byrgja uppfyri, so verjubrølarin ikki gjørdist til meiri enn ein kvøkkur.

### Avgjørt síðstu løtuna

Í 2. hálvleiki trýsti Sumba heilt nógv fyri at fáa útjavnandi málið. Teir fluttu fólkið langt fram, og teir høvdu fleiri upplagdar møguleikar at skora, men teir fingu ikki mál. Bæði tí at Valdemar stóð seg væl, og tí sumbingarnir ikki vóru nóg neyvir, tá teir vóru komnir í góðar støður.

At Sumba legði so stóra orku í álopspartin hevði við sær, at tað var opið í verjuni. Heimaliðið kom tískil fleiri ferðir í yvirtalsstøður, men teir megnaðu ikki at fáa mál, tí ofta var næstsíðsta sendingin ikki nóg neyv.

Fróði Mortensen var hesa ferð í Sumbiar málinum. Hann helt tætt, inntil tað restaðu tíggju minuttir. Tá metti Niklas á Líðarenda, at Jan Poulsen hevði spælt bóltin við arminum í brotsteiginum, og liðformaðurin, Eli Hentze var tryggur úr ellivu metrum. Hann var saman við Michael Jørgensen hangandi álopsmaður aftanfyri Høgna Hansen, sum var einsamallur heilt á toppinum.

Høgni Hansen staðfesti heimasigurin sjey minuttir undan leikloki. Uppspæli var í vinstru, og í staðin fyri at senda tætt inn undir málið valdi Alex Nielsen at senda eitt sindur út frá til Høgna Hansen, sum var í góðari støðu, tá hann takkaði fyri møguleikan og skoraði til 3–0.

**jh**

**B71-Sumba 3-0 (1-0)1-0:**
Bergleif Sólsker 17
2-0: Eli Hentze 80 (br.)
3-0: Høgni Hansen 83

**B71:**
Waldemar Nowiscki – Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen, Bergleif Sólsker – Bjørn Thorsteinsson, Kári Nielsen, Julian Florescu, Alex Nielsen – Eli Hentze, Høgni Hansen, Michael Jørgensen

**Sumba:**
Fróði Mortensen – Mortan úr Hørg, Marlon Kjærbo, Bergur Vinther – Hallur Dam Joensen, Jan Poulsen, Hans Jákup Thomsen, Spasojé Biberdzic, Nicola Biberdzic – Nebosja Velkovic, Sasa Tomajek

# Hvørgin fekk frið

***2. deild:** Hvørki HB ella KÍ kunnu kenna seg vís í stríðnum um niðurflyting, eftir at liðini býttu stigini leygardagin*

Jákup Mørk




*Eyðun Højgaard taldist millum fáu ungu leikararnar á HB liðnum, sum var heppið at fáa annað stigið móti KÍ*

### HB-KÍ 2-2 (0-1)

Fyri bæði liðini var tað av altavgerandi týdningi, at stig fingust burtur dystinum leygardagin. Einamest tóktist hetta umráðandi hjá HB, sum síðani summarfrítíðina hevur havt kós beint móti botninum, meðan tað hinvegin hevur gingist klaksvíkingunum nakað betri.

HB liðið er nógv broytt seinastu dystirnar, og verður tað nú í nógv størri mun satsað upp á royndar leikarar, ístaðin fyri at vóna, at teir yngru skulu halda liðinum uppi. Sostatt var bert pláss fyri Eyðuni Højgaard og Ransin N. Djurhuus av teimum yngru í byrjunaruppstillingini. Royndir menn so sum Jónleif Sólsker, Kaj Leo Johannesen, Gunnar Mohr og Heðin Joensen vóru millum teirra, sum mannaðu hini plássini.

Hjá KÍ var talan um eitt sindur meira blandað fólkaslag, men tað vóru tó tveir leikarar við royndum, sum stóðu fyri tí mesta. Tomislav Sivic og Allan Joensen vóru allar 90 minuttirnar á vøllinum, og tað var eisini fyrst og fremst, tá hesir høvdu bóltin, at vandi var á ferð.

Einasta málið í fyrra hálvleiki var eisini eitt úrslit av samspæli teirra millum. Tomislav fekk bóltin í einum kvikum mótálopi, og tá Allan yvirlappaði, varð bólturin sleptur júst í røttu løtu, og Kaj Leo hevði ikki ein livandi kjans, tá bólturin varð langaður fram við honum.

### Sovandi út

Størsta partin av fyrra hálvleiki var tað KÍ, sum hevði yvirvágna í spælinum, og eftir at teir kundu fara til hálvleiks við lítlu leiðsluni, mundu tey flestu rokna við, at teir eisini skuldu vinna dystin. Tað tók tó ikki HB leikarunum nógva tíð at fáa javnvág í roknskapin. Eftir at hava givið bóltin upp, var ein long sending løgd oman móti horninum, og tá bólturin so varð lagdur inn fyri, setti Florin Mihaéscu kollin á.

KÍ leikararnir tóktust ørkymlaðir av hesum, og eina løtu eftir málið, hevði HB greiða yvirvág, og fleiri heilt góðir møguleikar spurdust eisini burtur úr, men mál fingu teir tó ikki. Spakuliga kom KÍ við aftur í dystin, og aftur vóru tað teir báðir veteranarnir, sum tóktust vandamestir. Serliga Tomislav var væl upplagdur, og tað var meira enn tí einu ferðina, at hann so at siga gjørdi gjøldur burtur úr Bjarka Mohr, sum hevði ótakksamu uppgávuna at mansverja jugoslavan.

KÍ legði seg á odda aftur, tá Allan Joensen dróg frá miðjuni, og staddur skamt uttan fyri brotsteigin lat hann skot av. Kaj Leo hálvbjargaði, og eftir at hava fingið fatur á returinum, kundi Tomislav sera hegnisliga senda bóltin í netið frá spiskum. KÍ hevði eftir hetta onkran heilt góðan møguleika at leggja seg á odda, men líkt var til, at teir máttu taka til takkar við einum teprum sigri.

Hetta gjørdist tó av ongum, tí heldur óneyðugt fekk HB fram móti dystarenda javna fyri aðru ferð. KÍ málverjin, Meinhard Joensen, framdi eitt fullkomuliga óneyðugt brotsspark, tá hann fór út eftir einum hornasparksinnleggi, og Florin takkaði fyri møguleikan.

Sostatt gjørdist javnleikur úrslitið, hóast KÍ løtu seinnu átti brotsspark. Dómarin metti tó, at brotið móti Tomislav varð framt á sjálvum brotsteigarmarkinum, og tá frísparkið frá Tomislav tók undirsíðuna á tvørtrænum, slapp HB við skrekkinum.

Eitt stig í part var helst minni, enn báðir partarnir høvdu vónað. Tað bøtti tó nakað um støðuna, at Royn tapti móti B36, so alt í alt gjørdist fjarstøðan til beinleiðis niðurflyting størri.

**HB-KÍ 2-2 (0-1)**
0-1: Allan Joensen
1-1: Florin Mihaéscu
1-2: Tomislav Sivic
2-2: Florin Mihaéscu (br.)



*Vágbingar hildu vágamenn á botnsessinum, samstundis sum teir sjálvir lupu bukk um B68, soleiðis at teir nú eru á silvurplássinum*
*Mynd: Áki Bertholdsen*



# Vágbingar halda stílin

*Men tað gekk ein tími, áðrenn rættulig ferð koma á málskjótingina ímóti illa sperdu vágamonnunum*

VB er framvegis eitt gott boð upp á meistaraskapin. Sunnudagin høvdu teir vitjan av botnliðnum úr Vágum. Tað var týðuligt á útgangsstøðinum, at heimaliðið var oddalið, og at gestirnir vóru botnlið. VB leyp á við nógvum fólki og fullari ferð, meðan FS Vágar royndi at verja. Teir høvdu bara Kim Poulsen í álopinum (Birgir Joensen kom á vøllin í 2. hálvleiki), og teir hildu alla tíðina nógv fólk afturi á egnari hálvu.

VB legði fyri sum eitt ódnarveður. Tað mesta gekk fyri seg í og kring brotsteigin hjá FSV, og fyrstu trettan minuttirnar trýstu vágbingar seg til eina rúgvu av hornaspørkum.

Hesi góðu einki mál, og so fór eitt sindur av guvuni burtur. FSV hevði okkurt álopið á tekniborðinum, men so var tað, at VB fekk hol á. Tað trýsti gestirnar niður, og fram til 57. minutt, tá VB økti til 2–0, var talan um eitt støðugt trýst á málið hjá Remi Mikotionis, sum hevði nógv at gera, meðan Bjarni Johansen í hinum endanum so at siga var arbeiðsleysur.

Á miðvøllinum vóru Palli Augustinussen, Tórður Holm, Milan Kulic og Jón Pauli Olsen greitt omaná í stríðnum ímóti Sonna Johansen, Hannus Olsen, John Johansen og Igor Kiriilovas, sum er ein fínur bóltspælari, men sum ikki kennir seg heilt á heimabeiti, tá tað meiri er talan um stríð, enn um spæl.

VB var alla tíðina yvirmannað á miðvøllinum, tí vongverjarnir báðir, Predrag Zivkovic og Magni Jacobsen ikki høvdu nakran mann at ansa, og harvið kundu luttaka nógv í framrættaða spælinum. Vágbingar vóru kaldir og tóktust trúgva upp á, at tað var bara ein spurningur m tíð, áðrenn stóra leikliga yvirvágin fór at verða umsett til fleiri mál, og soleiðis tørnaði tað eisini út.

### Málini

VB fekk hol á í 15. minutti. Hornaspark úr høgru varð sent tvørturum og innfyri aftur málið, har Robert Cieslewicz ikki var ansaður og tískil hevði lætt við at seta síðsta fótin á.

1–0 gjørdist til 2–0 í 57. minutti. Milan Kulic sendi fríspark úr vinstru og til handara stólpan, har Krysztof Popczynski hevði síðsta fótin á. Og so gekk skjótt við málskjótingini.

Tað bleiv 3–0, tá ein tími var farin. Altíð vandamikli Jón Pauli Olsen smekkaði flatt langskot dygst fram við stólparótini.

Tað sá út til, at hetta skuldi gerast úrslitið, men tá tíggju minuttir vóru eftir, var FS Vágar málverjin sera óheppin. Hann tóktist hava tak á kiksaðari sending frá einum av viðspælarunum, men ólukkutíð fyri málverjan og FSV, so støkk skrúvandi bólturin framvið málverjanum og inn um strikuna.

Tá fór luftin rættuliga úr vágaliðnum, og síðstu minuttirnar gjørdu teir báðir sera vandamiklu útlendingarnar í VB álopinum hvør sítt mál. Bæði komu eftir skjótálop.

### Ymisk útlit

Vágbingar og vágamen fóru í góðveðrinum á Vágseiði av vøllinum við púra hvør sínari næstu framtíð. VB, ið næstu ferð hevur Predrag Zivkovic leikbannaðan, stríðist fyri heiðursmerkjum, sum tað framvegis er møguleiki fyri verða av gulli.

FS Vágar skal berjast fyri at sleppa burtur av aftasta plássinum og harvið beinleiðis niðurflytingini. Teir í Vágum vóna, at Tór–Ingar Akselsen verður tøkur, tá teir komandi sunnudag fáa vitjan av B71.

**jh**

**VB:**
Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Michael í Lágabø, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Tórður Holm, Milan Kulic, Jón Pauli Olsen – Krysztof Popczynski, Robert Cieslewicz

**FS Vágar:**
Remi Mikotionis – Heðin Joensen, Eyðfinn Fjalsbak, Zilva Zudis, Albert Ari Thomassen, Rimvadis Bakus – John Johansen, Igor Kirilovas, Hannus Olsen, Sonni Johansen – Kim Poulsen

# Tað verður torført hjá Royn

*2. deild: B36 fekk uppreisn eftir tapið seinasta vikuskiftið, og nú verður tað torført hjá hvalbingum at vera verandi í deildini*

Jákup Mørk

### Royn-B36 0-1 (0-0)

Kravið hjá Royn undan dystinum var avgjørt ein sigur, tí umframt at liggja á aftasta plássi, so hevur liðið eisini eina sera torføra skrá í dystunum, sum eftir eru. Hetta var eisini næstseinasti dysturin heima á grasinum í Hvalba.

Tað gekk tó ikki, tí B36 tók øll stigini við sær norðuraftur. Einasta málið gjørdi Tórálvur Poulsen beint eftir steðgin, og tað var nóg mikið at tryggja B36 sigurin.

B36 broderaði seg ígjøgnum í vinstru síðu, og tað endaði við, at Tórálvur Poulsen kom at standa púra leysur við málverjanum beint undir málinum. Hann trillaði bóltin kalt framvið málverjanum til 1-0.

### Vindurin darvaði

Serliga í fyrra hálvleiki var sera nógvur vindur tvørturum vøllin, og hetta darvaði spælinum sera nógv. Havnarmenninir høvdu eisini torført við at venja seg við undirlagið, sum kanska var heldur ójavnari, enn teir eru vanir við. Tí var lítið av skipaðum spæli at síggja og fáir málmøguleikar.




*Royn er nú sera illa spert í botninum, og havandi dystarskránna í huga, tykist sannlíkt, at teir komandi ár spæla í triðju deild*

B36 hevði teir stóru møguleikarnar í fyri steðgin. Tvær ferðir skuldu teir havt sett bóltin í netið. Fyrst fekk Tórálvur Poulsen eina sending frá miðvøllinum, og hann gjørdist púra leysur. Hann dró heilt nær málinum, men málverjin bjargaði sera flott tí harða skotinum.

Kanska størsta møguleikan í øllum dystinum hevði Bárður Olsen hjá B36. Málverjin hjá heimaliðnum hálvbjargaði einum langskoti, og B36 framherjin var fyrstur á bóltinum, men beindi hann uppum úr 5-metra fjarstøðu.

Royn hevði lítið at bjóða uppá fyri steðgin, og ongan veruligan málmøguleika fingu teir.

Móti endanum av dystinum legði Royn trýst á B36 fyri at at fáa útjavnandi málið, men allar roynddirnar miseydnaðust. Eini tríggjar vandamiklar royndir stóðust av trýstinum, men málverjin hjá B36 noyddist ikki at gera nakra stóra bjarging.

Fyrrverandi landsliðsspælarin Jákup Símun Simonsen sat á beinkinum hjá B36 henda dagin, og hann spældi tað seinasta korterið. Hann vísti eisini, at hann ikki heilt hevur gloymt bóltkynstrið, men hann er ikki beinleiðis í landsliðsvenjing.

Royn er nú trý stig aftanfyri HB, sum er næstniðast. Enn eru ikki allar vónir brostnar, men tað verður torført. Royn hevur tveir útidystir móti ÍF og TB, sum bæði eru topplið, og ein heimadyst móti NSÍ. Hvalbingar skulu vinna onkran av hesum dystunum fyri at yvirliva.

Hinvegin hevur B36 nú aftur møguleikan at fáa heiðursmerki. Fýra stig eru fram til TB og ÍF á øðrum og triðja plássi. B36 hevur bara dystir í Havn eftir, og har standa teir seg vanliga sera væl.

**Royn-B36 0-1 (0-0)**
0-1: Tórálvur Poulsen